# Strangari reglur um boring á sjónum fara at stimbra íløguhugin

**OLJUVINNA** Vanlukkan hjá BP í Meksikoflógvanum hevur fingið íleggjarar at gera vart við seg, eftir at partabrævavirðið hjá BP fór í botn orsakað av dálkingini, og uttan strangari reglur fyri boring á sjónum er vandi fyri, at íleggjarar fara at seta sínar pengar í aðrar vinnugreinar



*Strangari reglur um boring á sjónum eru neyðugar fyri at varðveita íløguhugin hjá íleggjarum*
*Mynd: BP*

Árno Joensen:

Verða reglurnar um oljuboringar á sjónum ikki herdar, er vandi fyri, at íleggjarar fara at halda seg burturi frá oljuvinnuni, tí váðin er ov stórur

Tað heldur í hvussu er kanadiumaðurin Doug Pearce. Hann er stjóri í íløgufelagnum BC Investment Management, sum er eitt av teimum størstu í Kanada. Tí hevur tað vakt ans, at hann nú hevur biðið kanadiska orkumálaráðið, National Energy Board, gera strangari reglur og ásetingar fyri oljuboring á sjónum.

Í einum brævi til orkumálaráðið skrivar Doug Pearce, at tað er einki løgið í, at fleiri av teimum stóru oljufeløgunum kenna seg trýst til at fáa so stóran vinning sum møguligt fyri at gera sínum partaeigarum til vildar.

## Reglur fyri Arktis

National Energy Board hevur eftirlit við olju- og gassboringum í Kanada, og ráðið arbeiðir í løtuni við at gera nýggjar reglur, sum skulu galda fyri boringar á sjónum norðuri í teimum arktisku økjunum. Í brævinum biður Doug Pearce ráðið leggja tær nýggju reglurnar soleiðis til rættis, at tær skulu eggja til eina burðardygga menning heldur enn løtuvinning, sum skaðar umhvørvið.

Tann stóra dálkingarvanlukkan í Meksikoflógvanum hevur fingið fleiri umhvørvisfelagsskapir og andstøðupolitikarar í Kanada at heita á National Energy Board um at gera verandi reglur munandi strangari. Ein av talsmonnunum fyri strangari reglum sigur við blaðið Vancouver Sun, at ein skilagóð vinnuavgerð eigur eisini at vera ein skilagóð umhvørvisavgerð.

Vanlukkan hjá BP í Meksikiflógvanum hevur fingið íleggjarar at gera vart við seg, eftir at partabrævavirðið hjá BP fór í botn orsakað av dálkingini, og uttan strangari reglur fyri boring á sjónum er vandi fyri, at íleggjarar fara at seta sínar pengar í aðrar vinnugreinar.

## Meksikoflógvin ræðir

Hóast tað loksins eydnaðist BP at tetta lekan á botni í Meksikoflógvanum, meta amerikanskir granskarar, at næstan 80 prosent av oljuni, sum kom upp úr brunninum, er í sjónum enn. Stjórnin í Washington hevur roynt at sissa fólk og sagt, at Meksikoflógvin er ikki so dálkaður, tí nógva av oljuni er tikin upp ella upployst.



*Tað kunnu ganga fleiri ár, áðrenn øll oljan úr brunninum hjá BP er upployst í Meksikoflógvanum*
*Mynd: BP*

Men granskarar á lærda háskúlanum í Georgia siga, at stjórnin málar myndina alt ov ljósareyða. Teir siga, at tað er ein stór misskiljing, tá fólk siga ella halda, at olja, sum er upployst í sjónum, er burturi og tískil meinaleys.

-Oljan er har enn, og tað fer helst at taka fleiri ár, áðrenn hon er endaliga upployst og burturi, siga granskararnir í Georgia sambært Reuters.

arni@sosialurin.fo